# Nú skal tað verða

**Sigursvanda 10-mannafarið hjá vestmenningum hevur ikki havt tey bestu úrslitini higartil í ár, men bátsformaðurin, Eli Müller, sigur, at á Fjarðastevnu ætla teir sær at verða fyrstir á málinum**

VESTMENNINGUR
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Bátsformaðurin umborð á vestmenningi, Eli Müller, v.m., telist millum teir royndastu umborð á 10-mannafarinum. Rúni Joensen h.m., hinvegin rør við 10-mannafarinum fyrstu ferð í ár, og telist tískil millum teir feskastu*

*Mynd. Jens Kristian Vang*

Seinastu mongu árini hevur 10-mannafarið Vestmenningur altíð verið millum fremstu bátarnir, tá ið róð hevur verið kapp. Í ár tykist tað tó ikki sum um, at tað hevur gingið eftir ætlan hjá manningini um borð á Vestmenningi, og bátsformaðurin Eli Müller sigur, at teir ætla at leggja nógv fyri, so at fyrsti sigurin fæst í hús á heimasjógvi leygardagin.

### Endaspurturin ikki nóg góður

Í teimum róðrunum, sum hava verið higartil í ár, hevur tað ofta gingið rættuliga væl hjá Vestmenningi í startinum, meðan tað hevur gingið minni væl í endaspurtinum. Eli Müller ásannar, at teir ikki hava fingið endaspurtin at fungera, millum annað tí teir ikki hava verið heilt samdir.

Bátsformaðurin umborð á Vestmenningi sigur tó, at seinastu tíðina hava teir gjørt serliga nógv burtur úr venjingini, og hann vónar, at tað fer at síggjast aftur í úrslitinum á Fjarðastevnuni. Manningin umborð á Vestmenningi er alt royndir rógvarar, men summir av teimum hava ikki verið umborð á Vestmenningi áður, og tað spælir kanska inn, at teir ikki hava róð í einum 10-mannafari fyrr, heldur Eli Müller.

### Væntar javnan róður

Teir flestu av 10-mannafarsróðrunum í FM-kappingini higartil í ár hava verið rættuliga javnir, og Eli Müller væntar, at róðurin á Fjarðastevnu neyvan verður nakað undantak í so máta. Róð verður 1000 metrar eins og í Vági seinasta vikuskifti, og tá vóru flestu bátarnir sera javnar, og bert brøkpartar av sekundum vóru á muni.

At Vestmenningur er á heimasjógvi, heldur Eli Müller ikki verða nakran fyrimun, tí tað einasta, ið teir kunnu brúka tað til, er, at teir hava betur vitan um, hvar málið er, hóast málið ikki er tað sama sum tað, ið teir nýta undir venjing.

Vestmenningur vandi fyri seinastu ferð undan Fjarðastevnuni mikukvøldið, og í vikuni hevur eisini verið róð ímóti Kvívíkingi og Skálabátinum, sum verður við í róðrinum á Fjarðastevnuni. Tað eru vestmenningar, ið hava mannað sigursvanda bátin av Skála til stevnuna, og tað verður spennandi at síggja, hvussu tað fer at ganga.

### Ringt at gevast

Eli Müller hevur róð umborð á Vestmenningi í heili átta ár, og tí er hann, saman við Magna Johannesen, sum hevur verið umborð í 10 ár, millum teir royndastu av manningini. Ofta hevur tað verið upp á tal at gevast, men Eli sigur, at tað er ringt at leggja árina frá sær, tí man verður so bitin av tí, heldur hann. Ætlanin er tó at gevast, tá ið hetta kappingarárið er farið aftur um bak, men man veit aldrin, hvat framtíðin hevur at bjóða, sigur Eli Müller. Hann heldur tað verða gleðiligt, at kappingin millum 10-mannaførini í ár er so jøvn, tí tað hevur mangan verið eitt sindur keðiligt, tá ið bátar hava verið einaráðandi. Nú eru manningarnar meiri seriøsar, og tað sæst eisini aftur í róðrunum, heldur Eli Müller, sum saman við tíggju øðrum vestmenningum ætlar at rógva sigursvanda 10-mannafarið til sigurs í heimbygdini leygardagin.

## Listaframsýning í skúlanum

**Í sambandi við Fjarðastevnuna verður skipað fyri áhugaverdari framsýning í auluni í skúlanum í Vestmanna, har bæði kend listafólk, men eisini vestmenningar fara at sýna list fram**

Tað er bert fólk við tilknýti til Vestmanna, sum fara at sýna fram á listaframsýningini í Vestmanna Skúla á Fjarðastevnu. Framsýningin er rættuliga áhugaverd, tí at talan er bæði um málningar, seymaðar og vovnar myndir, umframt ymiskar tilevnaðar prýðislutir. Nógv av teimum umleið 20 fólkunum, sum fara at sýna fram, eru vestmenningar, sum ongantíð áður hava tikið lut á einari listaframsýning.

Tað er VÍF, sum skipar fyri framsýningini, sum er opin leygardagin frá kl. 18 til 22, og sunnudagin frá kl. 14 til 22. Tað kostar 20 krónur at koma inn á framsýningina, og allar inntøkurnar fara óskerdar til keyp av list, ið verður latin stovnum í bygdini.



## Gamla og nýggja kirkjan í Vestmanna

*Hendan myndin vísur gomlu og nýggju kirkjuna í Vestmanna samstundis. Nær myndin er tikin vita vit ikki heilt, men nýggja kirkjan kom síðst í 19. øld.*

*Mynd: www.vestmanna.fo*

# Øll bygdin hjálpir til

**Nývaldi formaðurin í VÍF, Eyðun Leo, sigur, at tað stendur ongantíð á at fáa vestmenningar at hjálpa til, tá ið VÍF skipar fyri ymiskum tiltøkum**

FJARÐASTEVNA
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Vestmenningar hava altíð staðið saman um sítt ítróttarfelag, og tað sæst eisini aftur á limatalinum. Okkurt um 1200 fólk búgva í bygdini, og ikki færri enn 670 fólk eru limir í VÍF.

### Hondbólturin størstur

Ítróttarfelagið í Vestmanna fevnir fyrst og fremst um tríggjar ítróttargreinar, nevnliga hondbólt, kappróður og badminton. Tað er neyvan nakað dulsmál, at hondbólturin er størsta ítróttargreinin hjá VÍF, og felagið telist eisini millum mest vinnandi hondbóltsfeløg í landinum.

Eyðun Leo, formaður í VÍF, sigur, at eisini badminton er veruliga við at gera um seg í bygdini, og nógv av yngru badmintonleikarunum teljast javnan millum vinnararnar, tá ið kappingar verða fyriskipaðar kring landið. Serliga á gentuøkinum er VÍF væl fyri innan badminton, sigur hann.

### Færri manningar í ár

Vestmenningar hava eisini mangan gjørt um seg í kappróðri, og í ár er neyvan nakað undantak. Hóast eingin bátur úr Vestmanna enn hevur vunnið nakran FM-róður í ár, so hevur tað verið nær, og serliga eru tað dreingja- og gentumanningin umborð á Havfrúnni, sum hevur verið nær við at vunnið.

Eyðun Leo greiðir frá, at í ár hevur VÍF bert tríggjar kappróðrarmanningar, nevnliga genturnar og dreingirnir umborð á Havfrúnni og so 10-mannafarið Vestmenning. Hetta er minni enn vanligt, og okkurt árið hava vestmenningar mannað ikki færri enn seks bátar, og tað er einki minni enn eitt bragd av einari so lítlari bygd, heldur Eyðun Leo.

### Óført at hjálpa til

Formaðurin í VÍF heldur, at tað er ein fyrimunur at hava bert tað eina ítróttarfelagið í bygdini, tí tað merkir, at øll bygdin stendur saman um felagið. - Hetta sæst eina best, tá ið vit hava okkurt tiltak, tí tað stendur aldrin á at fáa fólk at hjálpa til, sigur hann. - Hóast tað kann verða tungt at skipa fyri og at reka eitt slíkt felag, so er tað ikki, tí at tað stendur á við at fáa fólk at hjálpa til, sigur formaðurin í VÍF, Eyðun Leo, sum sjálvur verður burturstaddur á Fjarðastevnu.

ítróttur

Nr. 124 • fríggjadagur • 2. juli 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

**Støðan, 1. deild menn**

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 9 | 6 | - | 2 | - | 1 | 22 | 9 | 13 | 20 |
| 2 Skála | 9 | 5 | - | 2 | - | 2 | 20 | 10 | 10 | 17 |
| 3 B36 | 9 | 4 | - | 3 | - | 2 | 19 | 12 | 7 | 15 |
| 4 NSÍ | 9 | 4 | - | 3 | - | 2 | 14 | 11 | 3 | 15 |
| 5 EB/Streymur | 9 | 4 | - | 2 | - | 3 | 17 | 13 | 4 | 14 |
| 6 VB | 9 | 3 | - | 4 | - | 2 | 13 | 10 | 3 | 13 |
| 7 KÍ | 9 | 2 | - | 6 | - | 1 | 15 | 11 | 4 | 12 |
| 8 GÍ | 9 | 3 | - | 2 | - | 4 | 13 | 19 | -6 | 11 |
| 9 ÍF | 9 | 1 | - | 1 | - | 7 | 13 | 32 | -19 | 4 |
| 10 B68 | 9 | 0 | - | 1 | - | 8 | 6 | 25 | -19 | 1 |

# HB einsamalt á odda

**Í nógva mjørkanum í Gundadali mikukvøldið eydnaðist tað HB at vinna 1-0 á NSÍ, og harvið løgdu havnarmenninir seg einsamallar á odda, nú farið verður í summarfrí. Ikki færri enn tríggir mans vóru riknir av vølli í einum ikki serliga hart leiktum dysti**

HB-NSÍ
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tveir av sentralu leikarunum í dystinum, Janus Joensen hjá HB og Alexandar Jovecic hjá NSÍ. Janus var aftur á HB-liðnum eftir skaðafráveru, men fekk reyða kortið eftir góðan tíma, meðan Alexandar var mest eyðsýndi leikarin hjá NSÍ, og tað var óskiljandi, at hann bleiv skiftur út um sama mundið, sum Janus fekk reyða kortið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Føroyameistararnir úr HB hava lagt seg á odda í 1. deild við einum 1-0 sigri á NSÍ í Gundadali mikukvøldið. Undan dystinum var greitt, at vinnandi liðið fór at verða fremst í landskappingini, nú farið var í summarfrí. Báðir partar løgdu eisini nógv fyri, og fyrsta hálva tíman var leikferðin øgiliga høg, og til tíðir høvdu spælararnir sjálvir trupulleikar við at fylgja við.

### Óneyðug útvísing

Fyrstu løtuna av dystinum gekk rættuliga javnt á. Runavíkingarnir høvdu kanska bóltin meira enn heimaliðið, men hinvegin var meiri vandi á ferð, tá ið HB var í álopi. Fleiri ferðir vóru boð eftir Jens Martin í málinum hjá NSÍ, meðan tað sjáldan gjørdist veruliga vandamikið framman fyri Danny í HB-málinum. So líðandi yvirtók HB meiri og meiri dystin, og fleiri ferðir var heilt nær við, at teir løgdu seg á odda. Í 25. minutti slapp Rógvi Jacobsen leysur í høgru síðu av brotsteiginum og legði upp á tvørs, men Heine Fernandez, ið kom glíðandi, var akkurát ov stuttur til at røkka bóltinum. Minuttin eftir var aftur vandi á ferð, tá ið heimaliðið fekk eitt fríspark stutt uttan fyri brotsteigin hjá NSÍ, nakað úti í vinstru síðu. Ungi verjuleikarin, Vagnur Mohr Mortensen, ið var besti HB'ari á vøllinum, skeyt eitt væla fríspark, men Jens Martin var sum køtturin og fekk boksað út til horna.

Hálvur tími var leiktur, tá ið NSÍ púra óneyðugt vóru skerdir. HB var í álopi í høgra borði, og bólturin fór út av vøllinum. Linjuverjin dømdi bóltin til HB, og tað var vinstri bakkur hjá NSÍ, Sjúrður Jacobsen, so ónøgdur við, at hann skumpaði linjuverjan. Tey, ið kenna eitt sindur til fótbóltsreglarnar, vita, at slíkt kostar eina útvísing, og Petur Skarðenni var eirindaleysur. Ein púrasta óneyðug útvísing av einum so mikið royndum leikara.

Nú tók HB fullkomiliga yvir, og álopini skolaðu oman ímóti málinum hjá NSÍ, men Óli Hansen og Dánial Hansen í miðverjuni hjá runavíkingum stóðu væl, og teir báðir Rógvi Jacobsen og Heine Fernandez høvdu ilt við at sleppa framat. Eitt mál til heimaliðið lá í luftini, men tá ið tað eydnaðist teimum reyðu og svørtu at fáa bóltin fram við Jens Martini, stóð ein verjuleikari hjá NSÍ á málstrikuni og fekk beint bóltin av vandaleið, og tí var málleyst, tá ið farið var til hálvleiks.

### Liðskiparin avgjørdi

Frá fyrsta bríksli í seinna hálvleiki royndi HB at trýsta, og bert fýra minuttir eftir steðgin fingu teir sett hol á. Jákup á Borg sendi væl innfyri, og Heðin á Lakjuni skallaði ímóti málinum, men á sjálvari málstrikuni stóð Óli Hansen og skallaði burtur. Bólturin kom út til HB-liðskiparan Rúna Nolsøe, og staddur áraka brotsteigarmarkið smekkaði hann til. Skotroyndin tóktist ikki serliga vandamikil, men Jens Martin gjørdi sítt einasta mistak í dystinum, tá ið hann misti bóltin millum hendurnar, og so var 1-0 til føroyameistararnar. Leiðslan hjá heimaliðnum var uppiborin, men málið var ógvuliga heppið. Næstu minuttirnar var fleiri ferðir nær við, at heimaliði økti, men atsóknirnar vóru ikki nóg neyvar.

Ístaðin gjørdist tað javnvág í manningatalinum, tá ið okkurt um ein hálvur tími var eftir at leika. Vinstri bakkur hjá HB, Janus Joensen, gjørdi eitt groft fríspark á miðjum vølli, og gula kortið var upplagt. Tíverri fyri Janus og HB var hetta næsta gula kortið hjá honum í dystinum, og harvið bleiv hann vístur av vølli.

Nú kom NSÍ við aftur í dystin, og millum annað varð Súni Fríði Barbá sendur á vøllin fyri Alexandar Jovecic, so at runavíkingar fingu ein eyka áleypara. Tað var væl skiljandi, at Jógvan Martin valdi at seta ein eyka áleypara inn, men hinvegin var tað óskiljandi, hví Jovecic bleiv tikin út, um ikki hann var skaddur, tí hann var nógv tann besti hjá runavíkingum. Jovecic var bindiliðið á miðvøllinum, og nógv tann størsti parturin av uppspælinum fór umvegis hann. Eisini í verjupartinum var hann týðandi, og tað var hugaligt at eygleiða hann, tí hann flutti seg so væl á vøllinum og bjóðaði seg allatíðina til.

### Úr enda í enda

Runavíkingar fingu so líðandi eitt ávíst trýst á HB-málið, men framvegis tóktist tað vandamiklari, tá ið heimaliðið fór í snarálop við teimum báðu kviku vengunum, Heðin á Lakjuni og Jákup á Borg, á odda. Møguleikarnir vóru eisini fleiri í tali, og millum annað Jákup á Borg hevði einar tveir stórar møguleikar, har minst annar átti at givið mál.

NSÍ tveitti nógv fólk fram, og tá ið 10 minuttir vóru eftir at leika, gjørdust teir í yvirtal á vøllinum, tí Rúni Nolsøe fekk tað reyða kortið fyri eina ófantaliga takling. Nú var stórt trýst á HB-málið, men bert heilt fáar ferðir gjørdist tað vandamikið. Tað einu ferðina var trunkaspæl framman fyri málinum hjá heimaliðnum, men hóast fleiri skotroyndir, eydnaðist tað ikki NSÍ at fáa bóltin fram við Danny í HB-málinum, og fagnaðurin á teimum reyðu og svørtu var stórur, tá ið Petur Skarðenni brikslaði fyri seinastu ferð.

## FAKTA

**HB-NSÍ 1-0(0-0)**
1-0 Rúni Nolsøe 49.
**HB:** Danny Rasmussen - Hallur Danielsen, Vagnur Mohr Mortensen, Símun Eliasen, Janus Joensen - Jákup á Borg, Kári Nielsen, Rúni Nolsøe, Heðin á Lakjuni(72. Eli Thorsteinsson) - Rógvi Jacobsen, Heine Fernandez
**NSÍ:** Jens Martin Knudsen - Brynjólvur Nielsen, Óli Hansen, Dánial Hansen, Sjúrður Jacobsen - Alexandar Jovecic(64. Súni Fríði Barbá), Ian Højgaard, Jústines R. Hansen(76. Andy Olsen) - Helgi L. Petersen, Jónstein Petersen, Gert Langgaard
**Dómari:** Petur Skarðenni - Tvey tey fyrstu reyðu kortini vóru í lagi, meðan tann triðja var eitt sindur tunt. Hinvegin var alt ov ofta bríkslað fyri lítið og lætt, og dómarin hevði hug at seta seg sjálvan í fokus. Hetta oyðilegði rútmuna í dystinum, og leikararnir gjørdust eisini frustreraðir av tí sama. Tað má verða loyvt at hava kropskontakt í einum slíkum dysti, uttan at tað altíð skal bríkslast fyri frísparki og skapa øsing.
**Gult kort:** Hallur Danielsen, Heðin á Lakjuni - Jónstein Petersen
**Reytt kort:** Janus Joensen (2xgult), Rúni Nolsøe - Sjúrður Jacobsen